# Tey tíggju sjúklingaráðini

## Verð virkin luttakari í tínari viðgerð

### 1 SPYR
Spyr, um tú ert í iva um eitthvört, ella um tú ert bangin um tína støðu. Spyr umaftur um tú ikki skilir alt.

### 2 SIG FRÁ
Sig frá um ovurviðkvæmi er av heilivági, mati ella øðrum. Um heilivágin sum tú tekur, vitaminir, náttúruheilivág, serligan kost, ella um tú ert við barn. Heilsustarvsfólkið tørvar neyvar upplýsingar, til at tryggja støðu tína.

### 3 SIG FRÁ UM TÚ HEVUR ILT
Sig frá hvussu tú ert fyri og frá serligum eyðkennum sjálvt um tey ikki hava samband við sjálva sjúkuna.

### 4 RÆTTA NAVN OG P-TAL
Kanna um starvsfólkið hevur rætta navn og P-tal, áðrenn tú skalt til kanningar, viðgerð ella fáa heilivág.

### 5 FÁ UPPLÝSINGAR UM VIÐGERÐINA
Tosa við heilsustarvsfólkið um viðgerðina og kanningarnar, fyri at skilja tilgongdina betur.

### 6 TAK AVVARÐANDI VIÐ TÆR TIL VITALU
Gott er, at hava avvarðandi ella vin til samrøðu, fyri ikki at misskilja, og verða hent at minnast aftur á.

### 7 TILSKILA HVÖR AVVARÐANDI KANN FÁA UPPLÝSINGAR
Heilsustarvsfólkið eru bundið av tagnarskyldu og kunnu bert geva tær og forsjónara tínum, sum nevndur er, upplýsingar um heilsustøðuna hjá tær ella um viðgerðina.

### 8 SPYR UM FRAMHALDIÐ AV EFTIRVIÐGERÐINI
Fá vegleiðing um eftirviðgerðina áðrenn tú verður útskrivað/ ur. Hvar hon verður gjørd og av hvørjum, og hvat er neyðugt at gera hjá tær áðrenn.

### 9 KENN HEILIVÁGIN HJÁ TÆR
Umráðandi er tú veit hvussu heilivágurin virkar, hvussu leingi tú eigur at taka hann, um broytingar í skamtanini, og hvørja ávirkan hann hevur av tí tú etur og drekkur. Fá vegleiðing um heilivágsávísanina frá læknanum tá tú verður útskrivað/ ur

### 10 SKRIVA MINNISBROT
Skriva royndir tínar í eina dagbók, hvussu tú ert fyri, og serliga hendingar í sambandi við viðgerðina. Fyrireika teg til vitalu, og skriva niður spurningar sum tú vil hava svar uppá.

Gæðahandbók Landspítala: LSH-4276

LANDSPÍTALI